# Bøkur við føgrum myndum og greiðum teksti

**Súgdýr og Jørðin eru nýggjar bøkur, sum Skúlabókagrunnurin hevur givið út**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaksriv*




Føroya Skúlabókagrunnur hevur í samprenti við enska forlagið Dorling Kindersley givið 2 bøkur afturat út við felagsheitinum : "Hvat gat eg sagt...". Hetta eru bøkur, sum við føgrum myndum og greiðum teksti lýsa nakrar av mongu loynidómunum í náttúruni. Køn fakfólk hava ráðgivið forlagnum og borga fyri, at innihaldið er fullgott.

Frammanundan eru bøkurnar Havið, Regnskógurin og Rúmdin komnar út.

Súgdýr og Jørðin siga frá hvør sínum náttúruøki. Í hvørjari bókini sær eru nógvar forvitnisligar og livandi myndir, ið ikki bert eru ein fragd fyri eygað, men samstundis siga sína søgu ofta betur enn mong orð megna at gera. Bókarøðin er løtt og greidliga skrivað og á tremur við upplýsingum til børn og ung. Aftast í bókunum eru orðalýsingar og leitorðalistar, so lætt er at finna fram til tær røttu upplýsingarnar.

Súgdýr, ið Harry Davidsen hevur týtt, hevur m.a. frásagnir um apur, hvalir, kópar, bjarnir og kamelar. Dentur verður lagdur á at lýsa teir ótrúligu eginleikarnar, sum mong súgdýr hava.

Jørðin, ið Jens Petur Gaard týddi, sigur við hugtakandi myndum og greiðum teksti frá stórfingna heimstaði okkara - Jørðini. Her kann lesarin uppliva vanlukkur og vakurleika, alt frá oyðandi gosfjøllum til leikandi fossar.

Súgdýr og Jørðin eru upplýsandi bøkur til børn og ung bæði í heimi og skúla. Repro-Z hevur havt prentgerðina um hendi. Hvør bók er 48 blaðsíður og fæst í bókabúðunum fyri 84 krónur.










**CITROËN XSARA 2,0 HDI DIESEL STATIONCAR**
Árg apr.2001, Km 19.000. Sera væl hildin. Kr. 130.000.
**Tel. 373874 ella 228591**




Bilur 99.000 kr. bátur frá 99.000 kr.
**Tel. 224910 ella e-mail: carrent@post.olivant.fo**

# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD FOCUS STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg 16.maj 2002, Km 41.000. Sum nýggjur: - Centrallás- El.-Rútar-Hita í forrúti - Hita í Forsetrum - Radio v.bandsp. V.m. Bert 1 ár og 5 mánaðir. Seldur vegna keyp av 7. pers. Bili. Kr. 175.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 10.April 96, Km 70.000. Sera vælhildin: Automatisk gear - C.D.Anlegg - Centrallás - El. Rútar - El. Spegl v.m. . Kr. 85.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mar-97, Km 150.000. Fjarstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-Spoylara aftan- Alufelgur- v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 52.000. Kr. 66.000.



**PEUGEOT EXPERT 2.0 HDI 8.PERSÓNAR**
Árg Jan-03, Km 14.900. Selist vegna keyp av 4.Hjólstrekkjara. Sum nýggjur: Alufelgur- Eyka vetrarsett-Tónaðar rútar-El rútar-El-spegl-Fj.stýrt centrallás-C.D.Anlegg-Sleipikrók v.m. Kr. 250.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin: Aircondition-Alufelgur-Fjarstýrt centrallás- El Rútar-El Spegl v.hita. C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m.. Kr. 158.000.



**TOYOTA LANDCRUISER DIESEL**
Árg Maj 1986, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur. Leverast nýsýnaður. Kr. 28.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL STATIONCAR.**
Árg 08.Juni 95, Km 138.400. Centrallás - El.rútar - El-spegl - Radio v.bandspælara og CD Boks -. Kr. 78.000.



**HONDA CIVIC**
Árg Sept .2001, Km 20.700. Air-condition - El.rútar - El.spegl v.hita -Radio - Fjarstýrt centrallás v.m. Sum nýggjur. Tilboð kr. 135.000. Kr. 135.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg 17 Jan. 1997, Km 49.000. Fjarstýrt centrallás- El-rútar-El-spegl-Radio v.bandspælara eyka tectylviðgjørdur. Selist vegna flyting til Danmark. Kr. 58.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Sera vælhildin: Automatisk gear-Centrallás- El rútar- El.spegl-Radio v.bandspælara. Kr. 78.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL**
Árg 03 Marts 1993, Km 82.000. Sera vælhildin: El.Sóltak- Centrallás- El.Rútar- El.Spegl- Radio v.bandspælara -Eyka hjólsett v.píkum. Kr. 67.000.

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**


Nr. 241 - 18. desember 2003 Sosialurin 

Mercedes-Benz Vito 115 CDI:

# Smartur og væl virkandi vørubilur

**Mercedes-Benz Vito, sum fyrstu ferð kom á markanðin í 1995, er nú avloystur av einum nýggjum Vito. Í mótseting til forgangarin hevur hesin motorin uppá longs og verður drivin av bakhjólunum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Mercedes-Benz Vito 115 CDI XL vørubilur*



Tað er ikki bert av útsjónd at nýggi Vito líkist persónvognunum hjá Mercedes-Benz, koyrieginleikarnir eru so líkir einum persónvogni, sum tað ber til hjá einum vøruvogni, sum samstundis skal bera vektina av eini vørulast.

Nýggi Vito er ikki ein uppdatering av forgangaranum men ein heilt nýggjur bilur. Hann verður gjørdur við tveimum ymiskum aksilfrástøðum, trimum ymiskum longdum og tveimum ymiskum hæddum. So her eru góðir møguleikar at velja rætta bilin til tann ávísa tørvin.

At bilurin nú verður drivin av bakhjólunum nýtist ikki at vera til tað verra. Tí ein væl lessaður vørubilur sum verður drivin av bakhjólunum klárar seg væl í kava og hálku við teimum hjálpar- og trygdarskipanum, ið nútímans bilar hava. Vito hevur ABS bremsuskipan við anti-spinn og ASR regulering, elektroniska bremsukraftdeilaran EBV og bremsuassistentin BAS. Eisini hevur hann elektronisku stabiliseringsskipanina ESP.

Við øllum hesum framkomnu skipanum kann bilførarin hava tamarhald á bilinum undir øllum koyriumstøðum. Vito hevur skivubremsur við øll fýra hjólini, 3-punkts trygdarbeltir, airbag til bilføraran og tey ferðandi framman. Annars hevur bilurin hópin av innbygdum trygdarskipanum

Vito fæst við trimum ymiskum 2,2 litur CDI dieselmotorum við ávikavist 88, 109 ella 125 hk. Hann fæst eisini við tveimum ymiskum V6 bensinmotorum. Standardgirkassin er ein manuellur 6-trins, meðan hann eisini fæst við 5-trins automatiskum girkassa.

Bilurin er soleiðis innrættaður, at hann sum onki kann taka ein europlatt inn gjøgnum síðuhurðina. Sum standard er síðuhurðin til vørurúmið í høgru síðu, og baklúkan er hongd í erva. Útgávurnar við høgum taki hava tvær síðuhongdar hurðar sum standard.

Vito er vøruvognsútgávan, meðan Viano er MPV útgávan av sama bili. Báðir eru teir sera lættir at umgangast, bæði sum vørubilur og sum MPV, instrumentborðið er smart og ergonomiskt, girstongin situr væl fyri uppi undir instrumentborðinum. Á bilasøluni hjá Ivan Johansen verður sagt, at bilurin fæst í øllum teimum ymiska støddunum




*Marni Nattestad, sølumaður hjá Ivan Johansen Bilum, sýnir her, hvussu lættlinga Vito tekur plattar inn gjøgnum síðuhurðina*

## Mercedes-Benz Vito 115 CDI XL

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,2 litur 4 syl. CDI 150 hk |
| 0-100 km/t: | 16,2 sek |
| Oljunýtsla: | 11,6 km/l |
| Stødd: | |
| Longd | 475,0 cm |
| Breidd | 191,0 cm |
| Hædd | 188,0 cm |
| Vørurúm | 5,68 rúmmetrar |
| Prísur: | kr. 298.000,- v.MVG |
| Søluumboð: | Ivan Johansen bilar |
| | Hoyvíksvegur 63 |
| | FO-110 Tórshavn |
| | Tel. 313666 |
| | www.ivan.fo |



*Vito innan. Bilurin er lættur at koyra, girstongin situr væl fyri*

## Peugeot 407 komandi ár



Núverandi Peugeot 406 verður í summar avloystur av einum heilt nýggjum Peugeot 407. Alt týður upp á, at talan verður um ein sera spennandi og framkomnan bil við nógvari nýhugsan, smartum designi, trygd og koyrieginleikum, sum eru nakað heilt serligt

*Kelda: bilpriser.dk*

## Hyundai Getz diesel




Hyundai Getz, sum herfyri bleiv kosin "Årets bestseller 2003" í Danmark, kemur fyrst í komani við 1,5 litur common rail dieselmotori við beinleiðis innsprænging. Hyundai Getz 1,5 CRDi koyrir í meðal 20,8 km/l, men kann klárar heilt upp til 25 km/l

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

## 1 mill. Berlingo



Citroën hava framleitt yvir eina millión Berlingo á sponsku verksmiðjuni í Vigo, síðan bilurin fyrstu ferð kom á marknaðin í 1996

*Kelda: Motor Magasinet*